TB-Mjølnir 3-1 (25-18, 25-23, 13-25, 25-22)

# TB vann móti Mjølni og nervunum

**At byrja við spældi TB við nervunum uttaná, men so skjótt sum tær komu av við teir ringastu nervarnar, høvdu tær tamarhald á støðuni. Mjølnir lá væl fyri í trimum teimum fyrstu settunum, men tær vunnu bara eitt av teimum**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*




*Tað fór at líkjast einari endurtøku av finaluni frá í fjør, men TB megnaði at halda høvdið kalt í fjórða settinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

TB-leikararnir lótu ongan iva vera um, hvat lið er tað besta í føroyskum kvinnuflogbólti í løtuni, tá tær leygardagin vunnu ein tryggan sigur í steypafinaluni móti Mjølni.

At TB vann dystin, var ikki heilt so óvæntað, tí tær hava eisini verið fremst í landskappingini heilt frá byrjan. Men Mjølnir er einasta lið, sum hevur vunnið móti teimum í meistaradeildini, og harumframt vann Mjølnir steypafinaluna bæði í 2001 og í 2000. Tí vóru tað eisini summi, sum roknaðu við, at klaksvíkskvinnurnar kundu lumpa TB, eins og tær lumpaðu Drátt í finaluni fyri einum ári síðani. Tá var Dráttur fremst í landskappingini og vann tvey tey fyrstu settini í finaluni, men Mjølnir vann dystin 3-2. Eina løtu sá næstan út til, at søgan fór at endurtaka seg, men tað var bara eina løtu.

## Gloymdu nervarnar

Bæði liðini vóru so at siga fullmannað til dystin leygardagin. Burtursæð frá Beintu Klakstein, sum herfyri meiddi sær fótin, vóru allar við, eisini Gudrid Nolsøe, sum hevur verið uttanlands, men sum hevur spælt nakrar av dystunum hjá TB í ár. Hjá Mjølni var Tove Riksfjord komin heim úr útlondum til dystin, meðan Sólvá Eystberg, sum hevur verið við í onkrum av dystunum í hesum kappingarárinum, hesaferð var liðleiðari saman við Margit G. Joensen. Høllin á Hálsi var fullsett, og alt var klárt til eina rimmar finalu.

At byrja við var eingin munur á liðunum. Tey fylgdust heilt upp til 4-4, men so leyp Mjølnir avstað. Frá 4-4 løgdu tær seg á odda 9-4, og so noyddist TB at taka time-out. Nervarnir sótu uttaná hjá TB-kvinnunum hesa løtuna, og sjálvt um tær royndu at leggja trýst á Mjølnir, eydnaðist tað ikki, og tær bláu vunnu allar bóltarnar.

Men so líðandi tveittu TB-kvinnurnar teir ringastu nervarnar fyri borð, og tær fingu minkað munin niður í 10-11, og so átti Mjølnir tørn til at taka time-out.

Nú gekk aftur javnt á. Mjølnir kom framum 15-12, men TB fekk javnað til 15-15, og so skiftust liðini um at vinna bóltarnar fram til 18-18. Men so skuldi bert 17 ára gamla Ingun Midjord serva fyri TB. Og tað gjørdi hon so væl, at frá 18-18 endaði TB við at vinna settið 25-18.

## Royndirnar hjálptu ikki

Í øðrum setti var tað aftur Mjølnir, sum setti dagsskránna. Tær hildu seg frammanfyri allatíðina, og við 11-7 tók TB sítt fyrra time-out. Tað munaði einki, og Mjølnir førdi 18-11, tá TB aftur tók time-out. Suðuroyarliðið hevði tá gjørt nógvar feilir, serliga í byrjanini av settinum, meðan Mjølnir sá út til at hava fingið gott skil á sítt spæl. Settið sá út til at vera avgjørt, men tað var tað ikki. Spakuliga át TB burturav mjølnirleiðsluni, og nú riggaði tað væl hjá TB at leggja upp til smasjirnar hjá Gudrid Nolsøe, og tað gav Mjølnir trupulleikar. Tað hevur so ofta verið tosað um, at Mjølnir hevur so nógvar royndir at draga av, men tær sóu vit ikki nógv til, tí sjálvt um TB fór at spæla betur, so hevði eitt roynt lið ikki spælt sær av við eina so góða leiðslu, sum Mjølnir gjørdi í øðrum setti. Hvussu var og ikki, so fekk TB javnað til 20-20, og tá Mjølnir tók time-out, var støðan 24-23 til TB, sum sostatt hevði settbólt. Hann vunnu tær, settið endaði 25-23, og nú var 2-0 til TB.

## Hildu høvdið kalt

Hetta var júst sama støðan, sum Mjølnir hevði verið í móti Drátti í finaluni árið fyri, og tí vildi eingin — heldur ikki teir mongu suðuroyingarnir á áskoðaraplássunum — taka nakað fyri givið enn.

Og í triðja setti tók dysturin eisini eina heilt aðra leið. Mjølnir legði hart út og kom á odda 8-3, áðrenn TB tók time-out. Men leiðslan bara øktist, og tá avtornaði hevði Mjølnir vunnið settið so mikið sum 25-13.

Tað var ikki frítt, at onkur var farin at hugsa um eina endurtøku av finaluni í fjør. Mjølnir hevði verið langt frammanfyri í øllum trimum settunum. Kortini høvdu tær tapt tvey tey fyrstu, men nú sá út til, at tær vóru um at fáa fótin fyri seg.

Men TB helt høvdið kalt — nakað sum tær ikki høvdu gjørt í triðja setti. Triðja sett hevði verið ein ávaring um, at einki kemur av sær sjálvum, og at tær veruliga skuldu stríðast fyri tí, um tær ætlaðu sær at vinna henda dystin. Hjá Mjølni var hinvegin einki annað at gera enn at stríðast víðari. Tí bleiv fjórða sett eisini tað mest spennandi av øllum.

Nú góvu bæði liðini sítt ítarsta, og munurin var ongantíð serliga stórur. Tá fyrsta time-outið kom, var støðan 11-10 til TB, og tað var eisini gongdin. TB hótti við at fara frá Mjølni við støðuni 20-17, men Mjølnir kom afturíaftur og legði seg framum 22-21. Nú tók TB time-out, og tað hjálpti, tí TB vann allar bóltarnar, sum vóru eftir, og tá Mjølnir ikki kláraði at taka ímóti enn einum smasji frá Gudrid Nolsøe, var alt yvirstaðið. TB hevði vunnið 25-22 og vunnið steypafinaluna 2002.

## Liðavrik aftanfyri sigurin

Reint leikliga bleiv finalan einki serligt upplivilsi. Serliga í byrjanini vóru alt ov nógvir nervar við í spælinum, og tað var sum um hvørki av liðunum nakrantíð veruliga kom upp í hægsta gear. Samanumtikið hevði TB sigurin uppiborinan, tí tær høvdu fleiri streingir at spæla uppá. Hjá Mjølni var Tina Jacobsen einasta veruliga álopshóttanin, og tað var ov lítið. Maja Popovic hjá TB var einasti útlendski leikarin á vøllinum, men hennara leiklutur var ikki so stórur, sum hann onkuntíð hevur verið fyrr. Tað var fyrst og fremst eitt gott liðavrik, sum tryggjaði sigurin, og tá samanumkemur, er tað jú eisini júst tað, sum tað gongur út uppá.

Hjartaliga tillukku, TB.



*Tá dysturin var liðugur, var einki at siga til, at fagnaðurin á TB kvinnunum var stórur. Tær hava nú tryggjað sær steypafinaluna, og fyri framman bíðar sjálvt FM-heitið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



SÍ-ÍF 3-0 (25-15, 26-24, 25-14)

# Eingin slingur í sørvágsvalsinum

**SÍ vann sum væntað steypafinaluna móti einum skerdum og illa sperdum ÍF-liði, sum kempaði, men sum í veruleikanum ikki hevði stórar møguleikar fyri at vinna**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*



*Tað var fyrst og fremst í spælinum framman fyri netinum, at sørvingar tryggjaðu sær finalusigurin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sjáldan hevur nakað lið havt so ringar umstøður upp undir eina steypafinalu, sum ÍF hevur havt. Og sjálvt um einki skal takast frá SÍ, so eru tað umstøðurnar hjá ÍF, sum hava yvirskuggað alt annað í sambandi við finaluna. Tað fær ikki verið øðrvísi.

Í grundspælinum í landskappingini tapti ÍF allar dystirnar, men síðani tá hevur tað gingið nógv betur. Serliga gjørdi tað mun, at Odd Eliasen kom aftur á hevaraplássið, tí tað gav samstundis fleiri øðrum leikarum møguleika fyri at fara aftur á tey plássini, teimum líkar best. Síðani tá hevur alt verið nógv betri, og tað hevur eisini rættvísgjørt, at ÍF var annað liðið í steypafinaluni.

Vikuskiftið áðrenn finaluna hendi so tað, at Odd Eliasen sleit sær hælsinuna í dysti móti Fleyr. Ein dyggur smeitur fyri liðið, og tað gjørdist heldur ikki frægari av, at Jan Áki Olsen eisini varð skaddur í sama dysti. Ein annar av lyklaleikarunum, Bartal Eliasen, hevði verið á venjingarlegu við fótbóltslandsliðnum á Kypros alla vikuna upp undir finaluna, so umstøðurnar vóru alt annað enn optimalar hjá fuglfirðingum. Onkur glotti var kanska kortini at hóma. Veteranurin Bjarne Hansen var komin við aftur og skuldi styrkja liðið til finaluna. Men náttina fyri finaluna misti hann mammu sína, og so fekk hann sjálvandi heldur ikki verið við.

So SÍ var risastórur favorittur. Sørvingar stillaðu við sterkastu manning og høvdu enntá fingið veteranin Annfinn Joensen við eisini, so her skuldi ikki verið tað stóra at tosa um. Og tað bleiv tað heldur ikki.

## Løgdu hart út

Tá sørvingar ein og ein í nummarrøð runnu inn á vøllin áðrenn dysturin skuldi byrja, var tað rættiliga stuttligt at síggja, at tað vóru teir lægstu sum komu inn fyrst. Men eingin skuldi lata seg lumpa: Sum teir komu inn, gjørdust teir bara størri og størri, og tá so Rajko Petrovic við sínum tveimum metrum og eina sentimetri kom inn á vøllin, hevði tú longu varhugan av, at hetta fór at vera fyribils hæddarpunktið hjá flogbóltinum í Sørvági.

Heilt frá byrjan sá tað út til, at SÍ fór at vinna stórt. Teir løgdu seg beinanvegin á odda 5-0 og seinni eisini 10-3 og 19-10. ÍF hevði einki mótsvar til óhugnaliga sterka blokkin hjá SÍ. Annfinn Joensen (195 cm) og Rajko Petrovic (201 cm) blokkaðu so væl, at teir ikki bara steðgaðu álopsroyndunum hjá fuglfirðingum, men ofta endaði blokkurin eisini beint niðri í gólvinum hjá ÍF, so hann var effektivur bæði so og so.

Settið endaði 25-15, og tá hevði ÍF bara vunnið heilt fáar bóltar. Nógv av stigunum hjá teimum komu av feilum, sum SÍ gjørdi.

Í øðrum setti var øðrvísi. ÍF-liðið var sum hamskift. Teir løgdu seg framum frá byrjan, og síðani hildu teir seg 3-4 stig frammanfyri rættiliga leingi. Sørvingar fóru eisini at gera feilir, bæði frammi við netið og longri afturi á vøllinum, og tá støðan var 14-9, bleiv neyðugt hjá SÍ at taka time-out. Tað hjálpti, tí rútman hjá ÍF bleiv brotin, og so tók SÍ teir aftur. Endin á hesum settinum bleiv sera javnur. ÍF var eitt skifti á odda 21-20, men tá avtornaði, fóru sørvingar eisini avstað við hesum settinum, 26-24.

## Eingin slingur í valsinum

Tú sat við einum varhuga av, at fuglfirðingar høvdu givið tað teir kundu í øðrum setti, og at krútið nú so smátt var við at vera uppi. Og so var.

Eftir at teir høvdu verið trilvandi í øðrum setti vóru SÍ-ararnir nú aftur komnir upp í umsnaringar, og í triðja setti høvdu teir tamarhald á støðuni frá byrjan til enda. ÍF tók time-out við 13-7 og 17-11, men tað munti einki. SÍ hevði yvirvág, og við 24-14 høvdu teir dystarbólt. Nú hava sørvingar sum so ikki serliga góðar royndir við dystarbóltum, men hesaferð var eingin slingur í valsinum.

Allan dystin ígjøgnum hevði vælvaksni blokkurin verið eitt av sterkastu vápnum hjá SÍ, og tað var eisini blokkurin, sum tryggjaði teimum seinasta og avgerandi stigið í dystinum. Men tað stuttliga var, at tað hesaferð var lægsti maður á liðnum, Kaj á Stongum, sum saman við Annfinni Joensen blokkaði dystarbóltin niður í gólvið hjá ÍF. Nei, flogbóltur snýr seg ikki bara um hædd — als ikki.

SÍ vann altso steypafinaluna, og tað var væntað. Tað er væl møguligt, at teir eisini høvdu vunnið, um ÍF hevði verið við fullari styrki, men tað ber ikki til at gita um slíkt. Dysturin er spældur og avgjørdur, og so ikki meir um tað.

Samanumtikið bleiv finalan ongantíð serliga spennandi, og tað var spell. Bara í øðrum setti beit ÍF frá sær, men annars var munurin á liðunum ov stórur til, at tað nakrantíð kom veruligur spenningur í. Av tí sama kann eingin ivi vera um, at rætta liðið vann.

Hjartaliga tillukku, SÍ.

Til stuttleika kann at enda skoytast uppí, at tvíburðabrøðurnir Borko og Boban Ilic nú hava vunnið og tapt eina steypafinalu í part. Boban vann hana í fjør við ÍF móti Mjølni, sum Borko tá var leikandi venjari hjá. Í ár vann Borko so finaluna saman við SÍ móti ÍF og tvíburðinum Boban. Í leikarayvirlitinum í leikskránni til finalurnar stendur annars, at Borko hjá SÍ er 192 sentimetrar høgur, meðan Boban bert er 191 sentimetrar. Men tað er kanska tí, at Borko hevur eitt sindur longri hár enn Boban.



*Ikki sørt leskiligt tykajst sørvingar at hugsa, og hóast tað neyvan verður etið, so er ikki sørt, at smakkurin av steypinum mundi kennast góður, nú FM-møguleikin er fokin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*